## Pele er Gudurin

Blaðmaðurin hevur frætt, at Dido, sum blaðungur hevur verið á liði saman við tí legendariska Zico. Dido dylur ikki fyri, at tað var stórt at verða á liði saman við Zico, men tað er Pele, sum er "Gudurin" í Brasilia. Í 1984 var tann blaðungi Dido saman við liði sínum, Santos og leikti framsýningardystir á ymsum karibiskum oyggjum. Tann tá 44 ára gamli Pele var við teimum, og plagdi at koma inn tá 10 minuttir vóru eftir, bara fyri at geva oyggjabúgvunum eina uppliving fyri lívið. Og sjálvsagt eisini fyri at fjálga um pengakassan hjá Santos.



# Fótbóltur er ein

**– Eg vil ikki hava, at fótbóltur skal verða eitt ítriv ella ein grillveitsla. Eg fari at arbeiða hart fyri, at vit kunnu røkka tí hægsta støðinum, sigur nýggi brasilski venjarin hjá GÍ, Dido. Hann er hevur ferðast víða við fótbóltinum, og í síni spældi hann saman við legenduni Zico**



## Ítróttarprofilurin



**Heri Simonsen**
herisim@sosialurin.fo

-Liðini í Onglandi spæla so skjótt, at tey hava ikki tíð at fáast við tað vakra og poleraða spælið.

Nýggi venjarin hjá nýggja felagsliðnum, sum enn eitur GÍ/LÍF er avgjørdur. Hann hevur fingið heimstað uppi yvir handlinum hjá PW í Norðragøtu. Bert eitt hanagleiv frá vøllinum í Sarpugerði. Hann eitur Edson Silva. Men sum nógvir av sínum brasilsku landsmonnum hevur hann eitt kelinavn, sum við tíðini fær ein størri samleika, enn sjálvt føðinavnið.

Dido nevnist hann. Um tað so er í Gøtu, Leirvík, Jerusalem ella í Rio de Jaineiro. Dido heldur, sum so mong onnur tilkomin fótbóltsáhugað fólk, at tey liðini, sum hava leikt vakrasta fótbóltin í heimssøguni, eru landsliðini hjá Brasilia, sum leiktu í HM í ávikavist 1970 og 1982.

- Teir leiktu kanska ikki so skjótt, men sýndu heiminum list á hægsta støði!

Dido hevur sínar avgjørdu meiningar um fótbólt.

### Tað likamliga og tekniska

- Mín uppgáva, sum venjari verður at kombinera tað likamliga og tað tekniska. Eg vil heldur hava ein leikara, sum er seinur í ferð, men effektivur, enn at hava ein leikara, sum er skjótur í ferð, men óeffektivur.

- Mín ambisjón er at hyggja eftir aldri og førleika. Eg vil hava leikarnar at siga mær, hvørjar ambisjónir teir hava. Eg vil ikki hava, at talan skal verða um eitt ítriv, ella eina grillveitslu. Eg fari at arbeiða hart fyri, at vit kunnu røkka tí hægsta støðinum. Um ein leikari kennir, at venjarin investerar tíð og orku í hann, og motiverar hann. So fer hesin leikarin at siga: "Eg skal vísa venjaranum hvat eg dugi!".

- Vit skulu hava eina harða, men sunna kapping í hópinum. Tað skal verða soleiðis, at ein leikari, sum ikki er millum teir 11, sum byrja inni, at hann fer at siga við viðleikaran, sum byrjar inni: "Eg vil arbeiða fyri at kunna megna tað sama, sum tú."

Dido er ikki heilt liðugur at seta hópin saman. Hann vil gjarna hyggja eftir blaðungum leikarum. Hann vil gjarna lufta øllum møguleikum.

- Eg ætli mær at arbeiða við 20 útileikarum og 3 málverjum. Tað ber ikki til at fáa nóg nógv burtur úr við at hava 30 leikarar. Tá hevur ein ov lítla tíð til hvønn einstakan leikara. Eg havi ein góðan hjálparvenjara í Anton Skoradal, sum hevur leikt fótbólt á hægsta støði her, og sum hevur gott innlit í lokalsamfelagið. Tað er eisini ein sera spennandi tíð vit hava her. Ein merkir pionerandan, sum er í hesum nýsamanlagda felagnum, sigur Dido, sum er glaður og spentur um arbeiðssetningin hjá sær í Eystur Kommunu.

### Yrkisleikari 15 ára gamal

Longu sum 15 ára gamal fekk Dido - sum er uppvaksin í býnum Espirito Santo í landssynningshorninum av Brasilia – sáttmála við Flamengo. Dido er føddur 27. juni í 1962. Sum barn leikti hann við einum liði í heimbýnum, sum nevndist Desportiva Ferroviaria. Hann var í Flamengo, árini 1977-1981. Hon stríddi seg fram til 1. liðshópin, hóast nógvir vóru um boðið. Tað var her hann vandi og leikti saman við Zico, Pita og Paulo Isidoro. Flamengo vann

Sosialurin